Aðalfundur hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag:

# Alivinnan komin fyri at vera

**Føroya Arbeiðsgevarafelag vil hava lagari skattaviðurskifti til alivinnuna. Ein afturbering av skatti kundi havt við sær, at fleiri virkir høvdu havt betri møguleikar at hóra undan.**

AÐALFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Seinasta fríggjadagin hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag sín trýssinstjúgunda aðalfund. Á aðalfundinum kom millum annað fram, at felagið heldur, at nøkur viðurskiftið skulu broytast, so kreppuraktuvinnuni verður lív lagað.*

*Mynd: Savnsmynd*

Seinasta fríggjadag hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag (FAG) sín árliga aðalfund. Eini 30 fólk høvdu leitað sær á fund á Hotel Hafnia. FAG varð stovnað í 1943, so aðalfundurin í ár var nummar 60 í røðini.

Tveir nevndarlimir stóðu fyri afturvali friggjadagin, og báðir vórðu afturvaldir. Nevndin er sostatt óbroytt. Í nevndini hjá FAG sita Vilhelm M. Johannesen formaður, Kristoffur Laksá næstformaður, Leivur Michelsen, Bergur Poulsen, Jóhan Páll Joensen, Magni Arge og Gudmund Mortensen.

Sum vanligt er, so legði nevndin ársfrágreiðingina fyri limirnar. Vit hava valt at endurgeva nøkur av høvuðspunktunum í ársfrágreiðingini hjá FAG

### Alivinna komin fyri at vera

Stórur partur av ársfrágreiðingini var um ringu støðuna í alivinnuni. FAG metir, at hóast niðurgongd er í alivinnuni, sum felagið væntar verður í nøkur ár framyvir, so er vinnan komin fyri at vera. FAG væntar, at alivinnan fer at reisa seg aftur. Við kreppuni í alivinnuni í fyrru helvt av 90 árunum í huga, so átti avgjørt møguleiki verið fyri, at vinnan fóta sær aftur.

FAG metir eisini, at neyðugt er við lagaligari skattaviðurskiftum í alivinnuni. Víst verður á, at okkara grannalond hava væl lagaligari skattaviðurskifti, og vit áttu at fylgt sama hugburði.

FAG nevnir sokallaðu "carry back" skipanina, sum tryggjar alifeløgunum afturgoldnan skat, um roknskapirnir vísa stórt hall. Í 2000 hevði alivinnan stórt yvirskot, og mátti tí gjalda nógvan skatt. Í 2002 vístu roknskapirnir harafturímóti stórt hall, og tá átti møguleiki at verið fyri, at alifeløgini fingu pening aftur, sum tey máttu av við í skatti í 2000.

Í ársfrágreiðingini nemir FAG eisini við støðuna viðvíkjandi møguligari veðseting í aliloyvunum. Í løtuni hava peningastovnarnir ikki loyvi til at fáa veð í aliloyvinum, men stendur tað upp til peningastovnarnar sjálvar og Havbúnarfelagið, so verða hesi viðurskifti broytt.

Verður veðseting loyvd, metir FAG, at hóttafalli, ið rakar alivinnuna í løtuni, hevði verið væl minni. Felagið ásannar, at politiski myndugleikin ikki ynskir eina slíka skipan, og tað metir FAG verða óheppið, tí ein veðseting vildi hjálpt at fáa atgongd til betri og størri fígging, og harvið tryggja, at framleiðslan av alifiski heldur fram í Føroyum.

### Arbeiðsmarknaðurin tillagast

Ikki heilt óvæntað, so varð arbeiðsmarknaðurin eisini viðgjørdur á aðalfundinum. Felagið sigur, at verkfallið í vár var eitt av teimum drúgvastu í søguni hjá FAG, og at tað rakti bæði virkir og almenningin meint. Felagið setur tí fram spurningin um tíðin ikki er farin frá slíkari eirindaleysari framferð?

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, arbeiðir í løtuni við einum uppskoti, sum fevnir um ein fastan gerðarrætt og dagføring av semingsmannareglunum.

FAG hevur eftirlýst tryggar og rættsligar karmar á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og tískil tekur felagið fult undir við lógaruppskotinum, og mælir landsstýrismanninum í vinnumálum at leggja uppskotið fyri løgtingið.

### Støðug vinnupolitisk kós

FAG ásannar, at búskaparliga útlitini eru ikki tey somu, sum tey hava verið. Tað hómast nú ein støðugur støðgur í vøkstrinum, og innan ávísar vinnugreinar er støðan ring. Bæði alivinnan og rækjuvinnan eru hart trýst, men felagið vísir á, at tað er av alstórum týdningi, at politikkararnir megna at halda fast við ein støðuga vinnupolitiska kós. FAG vil ikki hoyra um, at tað almenna skal taka um endan, tí støðuga vinnupolitiska kósin má standa sína roynd bæði í upp- og niðurgongdstíðum.

Víst verður á, at skulu virkisleiðarar kunnu hugsa langsiktað, so er neyðugt at politikkararnir halda fast um ein ávísa vinnupolitiska leið. Verður tikið endan hvørja ferð brotasjógvar eru, so fara virkisleiðarar at kenna á sær, at tað er ikki neyðugt at hugsa langsiktað, um verkætlanirnar ikki eydnast, tí tað almenna tekur jú um endan, og í tí støðuni mugu vit fyri alt í verðini ikki enda í, sigur Føroya Arbeiðsgevarafelag.

---

†

Kunngjørt verður at kæri pápi, abbi
og langabbi okkara

**an An rea avi en**
Æðuvík

andaðist sunnudagin 24. august 2003
á Umlættingarheiminum í Gøtu, 94 ára gamal.

Farið verður av Ellisheiminum í Runavík
mikudagin kl. 19.00 í Nes kirkju.
Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**rnini**

Tey, ið vilja minnast Hans Andreas kunnu lata eina peningagávu
til Nýrafelagið, konto í peningastovnunum.

# Rættleiðing til grein um javnstøðu 23. august 2003

*Annika W. Joensen*

Í greini stóð, at Javnstøðunevndin hevur kannað níggju almennar nevndir og ráð. Rætta orðingin er, at Javnstøðunevndin hevur kannað allar nevndir og øll ráð, sum hoyra undir níggju aðalráðini. Tað snýr seg um umleið 70 nevndir og ráð.

Í greinini stóð, at íslendingar nýta umleið 5 milliónir kr uppá javnstøðuarbeiðið og at eg mælti til, at vit í Føroyum nýta á leið somu upphædd. Hetta er ikki rætt. Javnstøðunevndin hevur søkt um kr 1,3 millión til 2004 og latið inn eitt alternativ til játtan, sum er á leið kr 900.000.

Í greinini stóð, at forkvinnan er skuffað, tí bert eitt fólk arbeiðir við javnstøðu og tað bert partvísa tíð. Ongin er skuffað - heldur eldhugað og sannførd um, at framyvir fara fleiri fólk at arbeiða við javnstøðu, tí so nógvir fyrimunir eru av hesum.





# Opin dystur um glóðheita sessin



*Trý boð upp á ein nýggjan landsstýrismann við mentamálum: Outsidarin Finnbogi Ísakson, Annita á Fríðriksmørk og Hergeir Nielsen*

**Hólmgongan um glóðheita sessin í mentamálaráðnum er í hæddini í Tjóðveldisflokkinum, og eftir øllum at døma fellur avgerðin í dag ella í morgin. Nógv eru um boðið, men heitastu nøvnini beint nú tykjast vera Annita á Fríðriksmørk og Hergeir Nielsen. Finnbogi Ísakson spøkir sum avbjóðari til sessin**

MENTAMÁL
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er púra opið, hvør verður nýggjur landsstýrismaður við mentamálum.

Tað bendir alt á, nú Tjóðveldisflokkurin er heilt tætt við at seta ein nýggjan landsstýrismann við mentamálum. Sum Sosialurin skilir varð ætlanin, at nýggjur landsstýrismaður skuldi setast longu í gjár, týsdagin, men so mikil ivi er um, hvør tað skal vera, at tað lættliga kann koma í drag.

Í prinsippinum eru øll tjóðveldisfólk líka gott boð, verður sagt frá keldum í flokkinum. Høgni Hoydal, floksformaður, sigur fleiri uppskot vera komin til landsstýrismann, og hann væntar, at avgerðin fellur í vikuni.

Eftir at hann hevur lurtað eftir sjónarmiðum frá aðalstjórn, floksstjórn og tingmanning, heldur Høgni Hoydal seg hava gjørt upp við sjálvan, hvør hansara besta boð er, men tað verður hann ikki einsamallur um at gera av.

Tað er tingmanningin hjá Tjóðveldisflokkinum, sum hevur síðsta orðið, tá landsstýrismaður skal setast. Frammanundan hava bæði aðalstjórnin og floksstjórnin givið sítt tilmælið, og helst er nøkunlunda semja um, hvør skal í sessin, tá tingmanningin tekur endaligu avgerðina.

### Heitur sessur

Høgni Hoydal hevur røkt starvið, síðan Annlis Bjarkhamar varð koyrd úr starvið, men tað hevur leingi verið greitt, at hann bert sat fyribils, tí hann eisini er løgmálaráðharri.

At sessurin er heitur, er einki at ivast í, tí heili sjey ferðir hevur Tjóðveldisflokkurin sett fólk í mentamálaráðið, síðan hann fekk mentamál at umsita í 1998. Nú ræður um at fáa fólk í mentamálaráðið, sum kann halda til teir mongu brotasjógvarnar, sum javnan bresta á Hoyvíksvegi 72.

Tørvur er á einum støðuføstum ráðharra, sum kennir politiska spælið til lítar; eisini tá tað gerst gravskitið. Harafturat er tað ein sannroynd, at landsstýrisfólk hava verið í hornatøkum við sína umsiting, sum sambært tjóðveldisfólkum ikki altíð hevur verið sínum landsstýrismanni lýðin.

### Annita fyri Annlis

Annita á Fríðriksmørk, sum er tingkvinna í Suðurstreymoy, hevur verið nevnd sum ein møguleiki, og eftir øllum at døma verður stórt arbeiði gjørt fyri, at hon skal setast í starv.

Okkurt talar fyri henni, tí einki konufólk er í landsstýrinum, og hon kundi verið ein góður avloysari í so máta fyri Annlis Bjarkhamar, sum mátti lúta. Annita hevur áhuga fyri mentamálum, og harafturat er Suðurstreymoy ikki væl umboðað í mun til stóru undirtøkuna, flokkurin hevur í valdøminum.

Spurningurin er, um hon er tann rætta, tá tað ræður um at standa eitt nú løgmanni og umsitingini kurl. Sjálv vildi Annita á Fríðriksmørk einki avdúka, tá vit spurdu okkum fyri. Hon sigur bara, at flokkurin hevur nógv gott fólk at taka av og nógv atlit eru at taka. Sambært Annitu á Fríðriksmørk varð einki avgjørt, tá vit tosaði við hana á døgurða týsdagin.

Spurningurin er hinvegin, um hini tingfólkini í Suðurstreymoy vilja hava Annitu í landsstýrið. Tað slóðar vegin fyri Finni Helmsdal, ið hevur givið floksformanninum og samgonguni høvuðbrýggj, og bæði Jógvan Arge og Kristina Háfoss kunnu hóttast til næsta løgtingsval, um Finnur Helmsdal aftur fær gjørt vart við seg í løgtingum.

### Ísakson spøkir

Eitt alternativt boð er Finnbogi Ísakson, fyrrverandi løgtingsformaður. Hann hevur prógvað sín politiska dugnaskap, hevur drúgvar royndir og hevur umdømi sum ein snildur politiskur revur. Hann kundi hann verið maðurin, sum tók truplu uppgávuna á seg at rudda mentamálaráðið, tí hann er ein ráðaríkur maður, ið ikki letur seg trýsta.

Sosialurin veit um tingfólk, sum eru sinnað at stuðla Finnboga, og tað hevði so samstundis varðveitt eitt status quo í tingmanningini.

Hinvegin er ikki vist, at Finnbogi er áhugaður, tí hann hevur tikið seg úr politikki. Sjálvur kennir hann onki til ætlanina, men hann vísir ikki tankanum bakið.

– Fái eg tilboðið, so skyldi eg flokkinum at umhugsa tað gjølla. Men fyrst má eg fáa eina áheitan, síðan má eg hugsa um tað, og so má eg taka støðu, sigur Finnbogi Ísakson, sum kortini væntar, at yngri fólk enn hann skulu framat.

### Hergeir úr Suðuroy

Eitt triðja boð er Hergeir Nielsen úr Suðuroyar valdømi. Hann hevur sum lærari innlit í skúlaviðurskiftini, hevur áður verið landsstýrismaður og hevur verið ein álitismaður fyri flokkin í nógv ár.

Tað er ein sannroynd, at øll valdømini royna at gera vart við seg, og suðuroyingar mistu tíðliga sín mann, tá Óli Holm í stutta tíð varð avloysari í mentamálaráðnum.

Sum skilst er Unga Tjóðveldi sinnað at stuðla Hergeiri Nielsen. Tað kemst av, at felagið varð misnøgt við, at Annlis Bjarkhamar mátti lúta, uttan at tey fingu nakað afturfyri. Verður Hergeir Nielsen landsstýrismaður, kemur formaðurin í Unga Tjóðveldinum, Rúni Nielsen úr Vági, inn á ting, og so er skaðin gjørdur góður aftur.

Onnur evni eru undanfarnir landsstýrismenn sum Signar á Brúnni og Tórbjørn Jacobsen, ið hava verið noyddir at lagt frá sær. Men teir eru lítið sannlíkir. Signar hevur mest sum tikið seg aftur eftir stóra vónbrotið, tá hann ikki slapp aftur í landsstýrið, og Tórbjørn hevur úr at gera sum reiðari, fólkatingsmaður og løgtingsmaður.

Sostatt stendur stríðið millum tey trý: Annitu, Hergeir og Finnboga. Men tað kann eins væl gerast onkur heilt annar, tá av tornar.

## Afturvísir samtykt úr gerðabók

**Talan var ikki um nakra samtykt, tá gerðabókin hjá landsstýrinum umrøddi broytingarnar á arbeiðsmarknaðinum. Tað sigur Høgni Hoydal, varaløgmaður**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Varaløgmaður hevur onga viðmerking til ógvusliga og persónliga álopið, sum Bjarni Djurholm landsstýrismaður hevði á hann í lesarabrævi í blaðnum í gjár.

– Vit eru øll samd um, at broytingar á arbeiðsmarknaðinum eru neyðugar. Eg havi bara víst á, at tað ber ikki til at koma við einum lidnum uppskoti í einum so stórum og átrokandi máli. Tað skal hava viðgerð, bæði í politisku skipanini og millum feløgini á arbeiðsmarknaðinum, tí annars er tað deyðadømt frammanundan, sigur Høgni Hoydal, sum ikki vil inn á persónliga brigslið.

Bjarni Djurholm vil vera við, at hann hevur fingið heimild frá landsstýrinum at gera eitt liðugt uppskot um seming og fastan gerðarætt, men tað vísir Høgni Hoydal aftur. Gerðabókin í landsstýrinum ber annars á tað borðið, tí har verður sagt, at »heitt verður eisini á landsstýrismannin at skriva uppskot um arbeiðsrætt og seming«.

– Talan var um ein politiskan landsstýrisfund, har mál verða umrøtt tíðliga í prosessini at gera lógaruppskot. Tá málini eru liðugt viðgjørd, skulu tey fyri formligan landsstýrisfund, og núnstaðni tá er greitt, um landsstýrið er samt um eitt uppskot, sigur Høgni Hoydal, sum ongar trupulleikar sigur seg hava við at samstarva við Bjarna Djurholm.